TILTØK

Gudstænastur Leygardagin 14. des.
Christianskirkjan: kl. 20 v/ United Voices Royal Music
Kirkja: kl. 17 altarg., Elsa Funding

3. sunnudagur í advent
Vesturkirkjan: kl. 11, Familjugudstænasta, Ung stjørnuskot syngja. Bergur D. Joensen
Havnar kirkja: kl. 11, Sonja Klein
kl. 14 Sunnudagsskúlagudstænasta, Sverri Steinhólm
Argir: kl. 11, Heri Joensen
Kvívík: kl. 12 (skriftarmál kl. 11.40), Bjarni Bæk, dómpróstur. Talvan gongur fyri kirkjuna
kl. 16.30 Advents- og jólakonsert. *Í Vestmanna, Hósvíkar, Hvalvíkar, Haldarsvíkar og Tjørnuvíkar kirkjum* gongur talvan fyri Guds orðs boðan
Miðvágur: kl. 12 lestur. »Trífljóð« spæla á tvørfloytu
Klaksvíkar Sjúkrahús: kl. 10
Christianskirkjan: kl. 11, *Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Hans Eiler Hammer
Húsar: kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
Sumba: kl. 12, Lucia,
Vágur: kl. 19, jólakonsert við kirkjukórinum »Ljómi«, Patrick de Neergaard
Hvalba: kl. 14 Ólavur Rasmussen. (Jólini verða sungin inn, við luttøku av kirkjukórinum Ljómur og Suðuroyar Gospelkóri).
Tvøroyri: kl. 16, »Vit syngja jólini inn«. Níggjulestragudstænasta har komandi konfirmantar medvirka. Luciagongd. Fjølbroytt sang- og tónleikaskrá
Funningur: kl. 12 messa,
Norðskála: kl. 17 níggjulestra gudstænasta (kórið á staðnum syngur).
Eiði: kl. 19 níggju-lestra gudstænasta, Emil Olsen
Sjóvar kirkja: kl. 12 John Myllhamar
Gøta: kl. 12, Martin R. Jacobsen. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
Hattarvík: kl. 12, Elsa Funding
Fuglafjørður: kl. 12, altarg., Uni Næs, kl. 20 jólakonsert við Fuglafjarðar sangkóri og Fuglafjarðar hornorkestri
Skúvoy: kl. 12, Jákup R. Hansen

Samkoman Rhema
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli. Steindor, Torbjørn og Harald luttaka við sangi og vitnisburði. Eisini verður kaffi. Øll eru vælkomin.
www.rhema.fo

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 verður eisini Møti har Magni Jacobsen úr Klaksvík talar.
www.hebron.fo

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta við kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsins tænasta við kommunión í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Orðsins tænasta við kommunión í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.

Meinigheitshúsið
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni – jólahugni.
Sunnudagin kl. 14 Jóla- og barnagudstænasta í Havnar kirkju, har Gentukórið luttekur, kl. 18 Jólafest.

Meinigheitin í Hoyvík,
uppi á Brekku 3
Sunnudagin hevur Sunnudagsskúlin jólaveitslu í Hoyvíkar skúla kl. 17, har øll eru hjartaliga vælkomin. Ongin gudstænasta vegna jólaveitslu. Mánadagin kl. 20.30 Bønarmøti.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin 15. des. kl. 18 í KFUK: Eldrasamkoman við Torleif Johannesen, sjómanstrúboðara. Skótarnir framføra jólaleik. Vit fáa nátturða.

Missiónshúsið við Landavegin
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum, kl. 18 Møti v/ Justines Poulsen.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Høskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
www.ebenezer.fo

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Fríggjadagin kl. 20 Jólafest fyri tey ungu.
Leygardagin kl. 19 Jólafest fyri tey eldru.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta, kl. 15 Jólafest fyri børn undir skúlaaldur, kl. 17 Jólafest fyri børn í skúlaaldri. Einki møti. www.koma.fo

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Lívdin
í Hoyvíkar skúla
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti og Tilbiðjunarmøti kl. 12 har Jógvan Z. talar um evnið: Tær sjey samkomurnar í Opinberingini – »Sardis«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Sunnudagsskúli er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 (í eini skúlastovu) Bíbliutími, undirvíst verður um Opinberingina.
www.livdin.fo

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13
Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin einki morgunmøti vegna jólaveitslu kl. 16.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ breyðbróting.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.
Telefonandaktin 424741.

Miðvágs missiónshús
Jólahald fyri børnum verður sunnudagin kl. 16.
Sunnudagin er einki møti.

Hósvík
Møti verður í kirkjuni 13. des. kl. 18.30 har Jon E. Johannesen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús, jólahugni.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Maibritt Frederiksberg, kl. 17 Barnajólafest. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Meinigheitshúsið á Skála
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20. Filmur verður vístur.

Lívsins Orð, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 10.30. Jólafest fyri børn verður sunnudagin kl. 16. Øll eru vælkomin.

Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Egil G.Olsen talar. Øll eru vælkomin. www.jesus.fo

Missiónshúsið í Æðuvík
Sunnudagin kl. 16 Møti v/ John S. Myllhamar.

Kirkjan í Elduvík
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ John Myllhamar, trúboðara.

Missiónshúsið í Gøtu
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20, Inga Mareta Klein úr Leirvík vísir ljósmyndir frá Ukraina. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Thabor, Fuglafjørður
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21. Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14.30 á Kambsdali og í Thabor og møti verður kl. 18.

Missiónshúsið í Skopun
Jólahugnin sum verða skuldi í kvøld er útsettur.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønar- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Jólatræið á Sandi
við missiónshúsið verður tendrað sunnudagin kl. 16. Prestur talar. Innsavnan til sunnudagsskúlan.

Betania, Skopun
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. mtiø. Vælkomin í Betania.

90 ÁR

Mánadagin 15. desember verður Alma Matras, Klaksvík, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin í Búðinum frá kl. 15.00-19.00.

BRÚDLEYP

Leygardagin 27. desember giftast Salmina Arnoldson og Teitur Poulsen. Vígslan verður í Havnar kirkju kl. 16.00. Veitsla fyri innbodnum verður á Hotel Føroyum kl. 19.00.

SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 9. desember *høvdu* Hildfrí og Kaj Egon Fagraberg, Miðvágur, silvurbrúdleyp. Opið hús verður heima leygardagin 13. des. frá kl. 18.00 har øll eru hjartaliga vælkomin.

Týsdagin 9. desember *høvdu* hjúnini Anna og Leivur Sørensen, Syðrugøtu, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík 30. desember kl. 20. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða vinarligast biðin um at siga frá á tlf. 441208, 442032 ella 456160 áðrenn 20. des.

Týsdagin 16. desember hava hjúnini Óluva og Jákup Marner Klein, Klaksvík verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin við, at opið hús verður í Skálanum frá kl. 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Týsdagin 16. desember hava Jórun og Andrew Vang silvurbrúdleyp. Opið hús verður í heiminum Sleipnisgøta 22 frá kl. 10-16 har øll eru vælkomin.

Mikudagin 21. januar 2004 hava hjúnini Sólborg og Osbjørn Joensen, Skálabotn, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 24. januar í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 441596 ella 214124 áðrenn 14. januar.

GULLBRÚDLEYP

Fríggjadagin 16. januar 2004 hava Selma og Byrger Heinesen, Klaksvík, verið gift í 50 ár. Tey ið vilja gleða gullbrúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 455441 ella 215442 innan 6. januar.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 13.12. Gøta tlf. 44 10 86
Sunnudagin 14.12. Fuglafjørður tlf. 44 40 38

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Gevið tí væl gætur eftir, hvussu tit liva, ikki sum óvísir, men sum vísir, so at tit keypa hina lagaligu stundina, tí at dagarnir eru vondir.

Ef 5.15-16.

Í vetrarhálvuni verður tíðum ávarað í Útvarpinum, at vegirnir eru hálir og glerstoyttir ymsastaðni kring landið. Rátt verður tí til at koyra varðisliga. Ein slík ávaring eigur sjálvsagt at takast í álvara og vera fylgd.

Ofta kann henda ávaring eisini vera galdandi okkara andaliga lív, men her er hon galdandi árið runt: Vandi á vegnum! Í tekstinum í dag, kemur Paulus við eini líknandi ávaring.

Vit syngja í einum sangi:

Vandi á vegnum,
varig má vera mín ferð,
til hon í himli
enda í sæluni er.
Steinar og stíggir
eru mær ferðini á,
ferðini forða,
ofta eg trongur man stá.

Sangurin er yrktur av danska trúboðaranum Peder Madsen, ið bara gjørdist 45 ára gamal. Hann gav út eitt sanghefti, sum hann gav heitið: »Kom til Jesus - og verð hjá honum«. Í hesum hefti stendur eisini hesin sangur.

Fyri nøkur menniskju kann vegurin við Jesusi verða bæði langur, knortlutur og vandafullur - og fyri onnur kann vegurin vera stytri og heldur lættari at fara. Men líkamikið um vegurin er stytri ella longri, so er ikki givið, at øll menniskju fyri tað náa á mál.

Tað stendur fast, at Guð hevur kallað allar føroyingar til at trúgva á seg og at fylgja sær, men hin óndi figgindi, Guðs mótstøðumaður, djevulin, vil við allari megi royna at fora fyri hesum og at gera vegin til himmals truplan og vandamiklan at fara, og ásannast má, at tað mangan hevur eydnast honum at fremja sína ætlan. Fylgirnar av hesum gerast, at menniskju støðugt liva í vanntrúgv og velja sær hin lættara vegin, glatannar vegin.

Kom til Jesus - og verð hjá honum - trúarinnar vegur kann eisini gerast vandafullur, men Jesus hevur lova, at tað, ið hann hevur byrjað, vil hann eisini fullføra, og tað merkir, hann bæði vil og er mentur at varðveita sína á trúarinnar mjáa vegi og føra tey ígjøgnum til æviga frelsu. Amen!

John S. Myllhamar, trúboðari

TILTØK

Missiónshúsið í Leirvík
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Marius Jacobsen. Innsavnan til húsið. Ungdómsmøti kl. 21, jólahugni og burturlutan.

Samkoman Getsemane, Klaksvík
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við barnavælsignilsi, André Matras talar. Tú ert hjartaliga vælkomin.

Soli Deo Gloria
Høskvøldið kl. 20 Jólahugni fyri ung.
Sunnudagin kl. 16 Jólafest fyri børn og vaksin, onki møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

KFUM & K, Klaksvík
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Pól Jóhannessen. Evnið: »Forbøn við handálegging og salving av sjúkum«, kl. 21 Ungdómsmøti.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Elidu og Karl Kenning. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur. Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

Missiónshúsið í Vági
Sunnukvøldið kl. 18 Møti, øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Leygarkvøldið kl. 20 Bíbliutími: Einglarnir.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti við Eddie Bech.

Missiónshúsið í Porkeri
Sunnukvøldið kl. 18 verður møti við Sigrid Ludvig og Denni Debes. Kórið úr Porkeri luttekur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sion,Vágur
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vækomin at ringja um tær tørvar forbøn.

Malta, Hirtshals
Leygarkvøldið kl. 19 Evangel. fundur í Skolehjemmet, Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Sunnukvøldið kl. 17 Evangel. fundur í Staldgårdsgade 4, Vejle. Talarar: Poul Jóhan, Levi og Rógvi.
Manskvartettin úr Betesda, Klaksvík, leiðir sangin. Eftir fundirnar borðreiða vit við føroyskum viðskera og Rís Alamande. Børnini fáa pakka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, ein
s og bløðini eru til taks.
Mánadagin 15. desember kl. 10-18 Jólahugni
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl,dart og onnur spøl.
Týsdagin 16. desember
kl. 10-15.00 Opið hús
kl. 15 Næmingar frá Tórshavnar musikkskúla hjá Andreu Heindriksdóttir og Ólavi Jacobsen spæla tvørfloytu og gitar
Mikudagin 17. desember
kl. 12 Røst riv
kl. 16 Dreingjakórið undir Brúnni syngur
Hósdagin 18. desember
kl. 14-17.00 Jólahugni
Fríggjadagin 19. desember
kl. 10-17 Jólahugni
Tilhaldið er stongt frá 23. desember til 5. januar 2004. Vit ynskja øllum eini góð og hugnalig jól og takka fyri tað skjótt farna.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar
í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.
Mánadagin 15. desember
Fimleikur v/ Jóhannu Troest. Drekkamuður
Týsdagin 16. desember
Drekkamuður. Vit gera jóladekoratiónir
Mikudagin 17. desember
Drekkamuður. Vit gera klárt til jólahugnan
Hósdagin 18. desember
kl. 17 Jólahugni í Kvinnufelagshúsinum
Jólafrí til 5. januar 2004. Vit í Fløvanum ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár, við tøkk fyri tað farna.

Eins og vanligt er, verður byrjað við einum Guðs orði, og framvegis eru luttakararnir vælkomnir at taka eitt og hvørt ítriv við sær, eitt nú stokkar o.a. Bløðini eru til taks í Fløvanum.
Serflutningstænastan v/ Andreas Poulsen er byrjað. Hava tygum tørv á koyring, ringið vinarligast tlf. 448051.

Tilhaldið Hugnin í Sandoynni
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa.
Mánadagin 15. desember
Børnini úr barnagarðinum ganga Lucia. Lilljan Sørensen úr Húsavík og Sølvi Mortensen av Sandi siga frá, hvussu tey minanst jólini frá barna- og ungdómsárum
Mikudagin 17. des.
Vit vitja í jólahúsinum í Skopun. Farið verður við bussi úr Tilhaldinum kl. 14. Kostnaður uml. 30 kr. Neyðugt er at melda seg til túrin antin í Tilhaldinum ella á tlf. 361990 í seinasta lagi mánadagin 15. des.
Mikudagurin 17. des. er seinasta dagur Tilhaldið er opið undan jólum. Vit hittast aftur mánadagin 5. jan. í komandi ári.
Gleðilig jól og eitt gott komandi ár.

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, miku- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Føroya Heimavirksfelag
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

NA (Anomymir narkomanar)
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00 Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og høskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.
Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt høskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr.
Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Heilafelagið
felagið fyri apopleksi- og afasirakt
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

Javni
Skrivstovan er stongt. Opið er aftur týsdagin 6. januar 2004. Ringjast kann tlf. 314827.
Teldupostur:
javni@post.olivant.fo

Felagið fyri lesi- og skriviveik
Postadr.: MBF-Húsið
Íslandsvegur 10c
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: tís- og hósdag kl. 13.00-16.00.
Fibromyalgibólkurin: Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
Foreldraumboð:
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50.

Deyvafelag Føroya
Íslandsvegur 10B
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597, fartlf. 222381, skrivitlf. 316929 fax 313609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

MBF – Meginfelag teirra brekaðu
Íslandsvegur 10c
FO-100 Tórshavn
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00. Tlf. 317373, fartlf. 264839 faks. 310813
Teldupostur: mbf@mbf.fo
Heimasíðan: www.mbf.fo

Alzheimerfelagið
Tórsbyrgi 16 · 100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

Sinnisbati
Íslandsvegur 10 C, 100 Tórsh.
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Grønlandsvegur 58, Tórshavn
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið,
Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 314796, Hallbjørg

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c,
Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.

LISA -
Skrivstovan hjá Listafólkasambandið Føroya í Pætursarstovu
Tlf: 320197
Teldupostur: lisa@lisa.fo
Heimasíða www.lisa.fo
Opið: mánad. - fríggjad. kl. 9-12, tó týsd. kl. 16.30 - 20.30.

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 15 til 18. LFÚ ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16 til 18.
Tinghúsvegur 18, 3. hædd, Tórshavn.
Tel. 310220 (skrivstovan)
tel. 315015 (ráðgevingin).
Teldupostur:
lfu@post.olivant.fo
Heimasíða: www.lfu.fo

Føroya Heimavirksfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Samband við felagið fæst við at ringja tlf. 322686.
Umsóknarblað til Heimavirksleguna í Danmark í summar kunnu fáast við at venda sær til felagið.

BRÚKARASAMTAKIÐ
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/ 211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn.

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624 og 315688, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo og maf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Listarligur ráðgevi: Birita Mohr. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.